ALMANNA- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF SOCIAL AFFAIRS AND CULTURE

Fíggjarmálaráðið
Tinganes
Postboks 2039
100 Tórshavn

15. februar 2023
Mál: 23/01877
Tygara skriv:
Viðgjørt: AKSS

Almanna- og mentamálaráðið hevur fingið uppskotið til Løgtingslóg um almenna talgilda postskipan til ummælis.

Almanna- og mentamálaráðið tekur undir við endamálinum við uppskotinum um, at postur, ið verður sendur gjøgnum talgildu skipanina, fær somu rættarligu støðu sum postur, ið verður sendur við pappíri og brævbjálva, og at tað er umráðandi, at borgarar trygt kunna samskifta talgilt við almennar stovnar.

Tó metir Almanna- og mentamálaráðið, at lógaruppskotið enn ikki er búgvið at leggja fyri løgtingið.

Lógaruppskotið setir sum krav, at almennir stovnar skulu samskifta umvegis Mínboks, tá tey senda viðkvæmar persónsupplýsingar ella trúnaðarupplýsingar talgilt til síni viðskiftafólk.

Sum Fíggjarmálaráðið vísir á, er neyðugt, at borgarar hava Samleikan fyri at rita inn í Mínboks. Samleikin er persónligur, og kann hetta verða ein forðing fyri persónar, ið eitt nú eru undir verju ella tørva hjálp frá starvsfólki ella avvarðandi, tí hesi kunnu ikki rita inn vegna borgaran. Eisini eru aðrar avbjóðingar fyri fólk, ið hava trupult við at brúka talgilt samskifti, sum neyðugt er, at lógin tekur atlit til.

Almannaverkið, og aðrir stovnar undir Almanna- og mentamálaráðnum, veita tilboð, tænastur og veitingar til fólk við serligum tørvi. Umframt formligt samskifti, hava hesi dagliga tørv á at samskifta við borgaran um teirra viðurskifti. Hesir borgarar fáa veiting ella tænastu orsakað av at tey hava serligan tørv, og tí er størsti parturin av samskiftinum viðkvæmt.

Mett verður at hesir stovnar við hesum lógaruppskoti fara at hava munandi truplari við at samskifta við borgaran. Hetta fer at ávirka tænastustøðið og gera tað truplari hjá Almannaverkinum at halda upplýsingar- og ráðgevingarskylduna.

Almanna- og mentamálaráðið mælir til, at Fíggjarmálaráðið arbeiðir víðari við málinum, og fær lýst málið frá fleiri sjónarhornum, m.a. hvussu talgilt samskifti kann fara fram, uttan at tað verður ein forðing fyri fólk við serligum avbjóðingum og fyri tey, sum kunnu hava avbjóðingar at brúka talgilt samskifti.

Vegna Almanna- og mentamálaráðið

Ann Kristina Svabo Simonsen
fulltrúi